**HEILSU- OG UMSORGANARTÆNASTAN**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn
heilsuhusid@torshavn.fo

Váttan fyri móttøku við dagfesting og stempul:

# Umsókn um stutttíðarpláss

Heimabúgvandi fólkapensjónistar og borgarar við demenssjúku undir pensjónsaldur, ið hava tørv á stutttíðarplássi, hava møguleika fyri at søkja um hetta. Stutttíðarpláss verða veitt á Urd og á Demensdeplinum á Tjarnargarði.

Endamálið við uppihaldinum kann vera ymiskt. Tað kann fevna um rehabilitering, endurvenjing, tørvsmetan, umlætting og palliatión.

Allar umsóknir um stutttíðarpláss verða viðgjørdar eina ferð um mánaðin. Um neyðugt, setur visitator seg í samband við teg fyri at avtala heimavitjan.

Tú fær ein teldupost ella bræv, tá ið tú fær játtað stutttíðarpláss.

Gjald fyri stutttíðarplássið verður kravt mánaðin eftir, at tú hevur verið í einum stutttíðarplássi.

Tú kanst lesa meira um stutttíðarpláss á torshavn.fo

## 1. Umsøkjari

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur og p-tal: |
| Fornavn: | Føðinavn: |
| Bústaður: | Telefon / fartelefon: |
| Postnr. og býur/bygd: | Teldupostur: |

## 2. Yrki

Yrki fyrr og nú:

## 3. Lækni

Tín lækni:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ert tú knýtt/ur at serlækna / sertoymi? | ☐ Ja | ☐ Nei | Um ja, hvørjum: ______ |
| Ert tú knýtt/ur at ambulatorium? | ☐ Ja | ☐ Nei | Um ja, hvat: ______ |

## 4. Heimaviðurskifti

Bústaður/heimaviðurskifti:

- ☐ saman við hjúnafelaga/sambúgva
- ☐ einsamallur/einsamøll
- ☐ hjá/saman við børnum
- ☐ hjá/saman við skyldfólki/vinfólki

REV 28.01.2026

## 5. Avvarðandi

*Avvarðandi kunnu vera fólk í familjuni ella vinfólk, sum vit kunnu seta okkum í samband við um neyðugt, í samband við viðgerð av umsóknini.*

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Eftirnavn: |
| Fornavn: | Fornavn: |
| Bústaður: | Bústaður: |
| Postnr. og býur/bygd: | Postnr. og býur/bygd: |
| Telefon/fartelefon: | Telefon/fartelefon: |
| Teldupostur: | Teldupostur: |
| Skyldskapur: | Skyldskapur: |

## 6. Orsøk til umsóknina

Greiðið vinaliga frá um orsøkina, at tú søkir stutttíðarpláss, og møguligum sjúkum ið tú hevur. Er eitthvørt hent nýliga, ið hevur broytt støðu tína:

## 7. Tíðarskeið

*Hevur tú eitt serligt ynski um tíðarskeið?*

Hevur tú eitt serligt ynski um tíðarskeið? ☐ Ja ☐ Nei Um ja, nær frá: ____________ til: ____________

## 8. Endamál

Hvat ynskir tú at fáa burturúr uppihaldinum? Hvat ynskir tú at megna betur?

## 9. Lýsing av gerandisdegnum

Hvussu er ein vanligur gerandisdagur – hvat fært tú dagin at ganga við?

## 10. Hjálpartól

Brúkar tú hjálpartól? ☐ Ja ☐ Nei Um ja, hvat: ____________

## 11. Kostur

Fært tú serkost? ☐ Ja ☐ Nei Um ja, hvønn: ____________

## 12. Sansir

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Minni: | | ☐ Við mítt fulla skil | ☐ Gloymsk/-ur | ☐ Dement/-ur |
| Sjón: | ☐ Síggi væl | ☐ Síggi hampuliga væl | ☐ Brúki brillur | ☐ Blind/-ur |
| Hoyrn: | ☐ Hoyri væl | ☐ Hoyri hampuliga væl | ☐ Nýti hoyritól | ☐ Deyv/-ur |
| Tala: | ☐ Ikki talubrek | ☐ Lítið talubrek | ☐ Ekspressiv afasi | ☐ Impressiv afasi |

## 13. Ert tú før/-ur fyri

| | | | |
|---|---|---|---|
| – at lata teg í og úr? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at vaska tær? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at matgera? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at fáa tær at eta? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at klára teg sjálvan um náttina? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at ganga? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |
| – at fara á wc? | ☐ Ja | ☐ Nei | ☐ Bert við stuðli |

## 14. Fært tú fylgjandi hjálp ella tænastur *(set kross)*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Heimahjálp? | ☐ Ja | ☐ Nei | Heimasjúkrarøkt? | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Ergoterapi? | ☐ Ja | ☐ Nei | Fysioterapi? | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Holdvenjing? | ☐ Ja | ☐ Nei | Dag- ella kvøldtilboð? | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Mattænastu? | ☐ Ja | ☐ Nei | Reingerðartænastu? | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Hjálp frá avvarðandi? | ☐ Ja | ☐ Nei | | | |

## 15. Viðgerð

Fært tú heilivág? ☐ Ja ☐ Nei

Um ja, fyri hvat og hvussu ofta?

## 16. Ovurviðkvæmi

Er tað nakað, tú ikki tolir, so sum heilivágur ella annað ovurviðkvæmi? ☐ Ja ☐ Nei

Um ja, hvat?

## 17. Aðrar viðmerkingar

## 18. Hvør hevur hjálpt tær at útfylla umsóknarblaðið?

| | |
|---|---|
| Navn: | Telefon/fartelefon: |
| Starvsheiti: | Teldupostur: |

## 19. Váttan til flyting

*Við mínari undirskrift gevi eg loyvi til, at gjaldið fyri samdøgursumlætting verður flutt fyri hvønn dag, ið eg eri í einum stutttíðarplássi:

| | | |
|---|---|---|
| Navn: | | P-tal: |
| Peningastovnur: | Skrásetingarnr.: | Kontonr.: |
| Dagfesting: | Undirskrift: | |

*Fyrivarni verður tikið fyri møguligari dagføring av kostnaðinum.

## 20. Undirskrift umsøkjarans

| | | |
|---|---|---|
| Eg vátti við hesum, at upplýsingarnar omanfyri eru rættar, og gevi loyvi til, at Heilsu- og umsorganartænastan um neyðugt í samband við viðgerð av umsóknini kann útvega sær viðkomandi upplýsingar um míni viðurskifti. Herímillum upplýsingar um mína heilsu- og sosialu støðu frá kommunulækna og sjúkrahúsverki. | Dagfesting: | Undirskrift: |

# Dátuvernd í sambandi við stutttíðarpláss

## Soleiðis viðger Heilsu- og umsorgarnartænastan tínar persónupplýsingar

Heilsu- og umsorganartænastan viðger persónupplýsingar, tá vit viðgera umsóknir um stutttíðarpláss, og meðan tú ert á URD/Demensdeplinum.

Heilsu- og umsorgartænastan er stovnur undir Tórshavnar Kommunu (TK). TK er dátuábyrgdari fyri tær persónupplýsingar, ið verða viðgjørdar um teg.

## Endamál við viðgerðini

Vit viðgera persónupplýsingar til fylgjandi endamál:

- At taka støðu til umsóknir um stutttíðarpláss
- Røkt og viðgerð, meðan tú ert á URD/Demensdeplinum
- Um tú tekur heilivág, varða vit av heilivágslista og heilivági, meðan tú ert á URD/Demensdeplinum

## Hvørjar upplýsingar viðgera vit?

Vit savna bert tær upplýsingarnar, ið eru neyðugar fyri at kunna viðgera títt mál.

Fylgjandi upplýsingar verða savnaðar um teg:

**Vanligar persónupplýsingar:**

- Navn
- Bústaður
- Føðingardagur og ptal
- Føðinavn
- Telefon
- Teldupostur
- Yrki
- Kontonummar

**Viðkvæmar persónupplýsingar:**

- Heilsustøða herímillum heilivág

## Heimild

Tínar persónupplýsingar verða viðgjørdar við heimild í:

- LL nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við LL nr. 159 frá 10. desember 2021
- Autorisatiónslógin, sum seinast broytt við anordning nr. 1444 frá 29. juni 2021

- Bekendtgørelse nr. 613 af 10. juni 2014 for Færøerne om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp
- Bekendtgørelse nr. 587 om autoriserede sundhedspersoners patientjournaler frá 10. juni 2014 §3 stk. 1-3 og §5 stk. 1-3
- LL nr. 23 frá 20. mars 2018 um bókhald (Bókhaldslógin)
- Dátuverndarlógin (Løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 10. mai 2024)

## Hvønn lata vit tínar upplýsingar til?

Vit kunnu lata tínar upplýsingar víðari til onnur, sum hava rættindi at fáa hesar upplýsingar. Td. innanhýsis í TK, aðrar almennar myndugleikar, stovnar og viðkomandi privatar aktørar.

**Vanligar persónupplýsingar:**

- Vit lata fíggjardeildini í TK upplýsingar, fyri at TK kann uppkrevja neyðuga gjaldið fyri tær tænastur, tú hevur umbiðið
- Vit lata upplýsingar til myndugleikar og privatar aktørar, um tað er álagt teimum í aðrari lóggávu
- Vit lata Apoteksverkinum upplýsingar í sambandi við skamtan
- Vit lata laboratoriinum upplýsingar í sambandi við blóðroyndir
- Í sambandi við andlát, lata vit upplýsingar til Sorinskrivaran og Apoteksverkið
- Sum almennur myndugleiki, og um upplýsingarnar eru mettar at vera savnindi, er álagt TK at lata hesar til Tjóðskjalasavnið, sambært LL. um skjalasøvn. Vanliga er øll málsviðgerð mett at vera savnindi

**Viðkvæmar upplýsingar:**

- Vit lata fíggjardeildini í TK upplýsingar, fyri at TK kann uppkrevja neyðuga gjaldið fyri tær tænastur, tú hevur umbiðið
- Vit lata upplýsingar til myndugleikar og privatar aktørar, um tað er álagt teimum í aðrari lóggávu
- Vit lata Apoteksverkinum upplýsingar í sambandi við skamtan
- Vit lata laboratoriinum upplýsingar í sambandi við blóðroyndir
- Sum almennur myndugleiki, og um upplýsingarnar eru mettar at vera savnindi, er álagt TK at lata hesar til Tjóðskjalasavnið, sambært LL. um skjalasøvn. Vanliga er øll málsviðgerð mett at vera savnindi

Vit kunnu eisini útvega okkum viðkomandi upplýsingar um tíni viðurskifti, herímillum upplýsingar um tína heilsu- og sosialu støðu, frá kommunulækna og sjúkrahúsverki. Hetta í samband við viðgerð av tíni umsókn um stutttíðarpláss, og í samband við tænastur veittar tær, meðan tú ert á URD/Demensdeplinum.

## Hvussu leingi goyma vit tínar upplýsingar?

Flestu upplýsingar skulu goymast, fyri at vit kunnu skjalfesta okkara málsviðgerð. Vit goyma bert upplýsingar um teg, so leingi sum tað er neyðugt fyri málsviðgerðina. Tá málsviðgerðin er endað, verður støða tikin til varðveitslu/striking av tínum upplýsingum, m.a. við støði í viðkomandi lóggávu.

Mál, sum eru partur av málsviðgerð og skrásett í journalini hjá TK, verða latin Tjóðskjalasavninum sambært LL um skjalasøvn og goymd fyri eftirtíðina har.

## Hvørji eru tíni rættindi?

Tú kanst fáa avrit av teimum upplýsingum, vit viðgera um teg (innlit). Tú kanst eisini kæra um, at vit viðgera upplýsingar um teg (átala, mótmæla).

**Tú kanst biðja um:**

- At tínar upplýsingar verða rættaðar ella strikaðar
- At upplýsingarnar verða sendar tær ella øðrum (rætt til dátuflutning)
- At viðgerðin av tínum upplýsingum steðgar

Um tú biður um at fáa strika upplýsingar, er henda umbøn ikki treytarleys. Sum útgangspunkt kann TK ikki strika persónupplýsingar, tí hesar, sum partur av málsviðgerð hjá almennum stovni, verða roknaðar sum savnindi, og skulu hesar, tá viðgerðin endar, flytast Tjóðskjalasavninum sambært LL um skjalasøvn. Aðrar orsøkir kunnu vera, at ávísar persónupplýsingar verða goymdar sum gjaldsgrundarlag, og kunnu hesar upplýsingar tí ikki strikast, men skulu goymast sambært ásetingum í Bókhaldslógini.

## Um tú hevur spurningar

Um tú hevur spurningar um viðgerð av persónupplýsingum í samband við títt mál, ella tú ynskir at gera brúk av tínum rættindum um td. innlit ella at fáa rættað persónupplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Tórshavnar Kommunu.

Allir spurningar og viðurskifti viðvíkjandi persónupplýsingum, dátutrygd og møgulig trygdarbrot skulu stílast til Dátuverndarfólkið (DPO) í Tórshavnar kommunu. Alt samskifti skal vera skrivligt og viðmerkjast »Dátuvernd«. Tú kanst skriva til dátuverndarfólkið við telduposti til DPO@torshavn.fo

**Tú kanst eisini senda bræv til:**

Tórshavnar kommuna
Dátuverndarfólk
Vaglið
Postsmoga 32
110 Tórshavn

Tá tú skrivar til okkara, mæla vit til, at tú nýtir teldupost. Teldupostur er skjótari og lættari hjá okkum at avgreiða.

## Dátuábyrgdari

Tórshavnar Kommuna er dátuábyrgdari.

## Kann eg kæra?

Tú hevur altíð møguleika at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/-ur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Tú finnur sambandsupplýsingar á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum: dat.fo

## Persónupplýsingarpolitikkur fyri borgaran

Um tú ynskir at lesa meira um persónupplýsingarpolitikk, sum TK hevur fyri borgaran, ber til at fara inn á torshavn.fo: Persónsupplýsingarpolitikkur